NSÍ-EB/Streymur 4-0 (2-0):

# Tað var eingin slingur í valsinum

**Hóast tveir av lyklaspælarunum sótu uttanfyri, so hevði NSÍ ongar trupulleikar at vinna stórt, og fram ímóti dystarenda var rættuligur klassamunur**

NSÍ–EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*



*Ulrik Balling var enn einaferð á blettinum, tá NSÍ enn einaferð fekk fulla úrtøku. Hesa ferð var talan um ivaleysan sigur móti EB/Streymi*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ spælararnir savnaðu seg aftur sunnudagin fult og heilt um uppgávuna á vøllinum. Og venjarin syrgir fyri, at tað bara verður hugsað um næstu uppgávuna. Áskoðararnir vóru fleiri, enn teir plaga at vera, tá gestirnir ikki draga nógv fólk við sær. Men tað er synd at siga, at heimaáskoðararnir hjá NSÍ eru so ógvuliga nógvir, tá hugsað verður um fólkagrundarlagið.

Áskoðararnir høvdu tað fínt, og hjá teimum er hugburðurin spakuliga broyttur. Teir hava so ofta droymt seg til skreyt og skrúð, og so hevur tað kortini kiksað. Eftir at løgmanssteypið er komið til býin, og eftir at tað eftir summarsteðgin hevur gingið sum eftir ánni, er fóturin loysnaður á bremsuni, og sunnudagin boðaðu gulu fløggini og lúrarnir frá, at tey kring vøllin eru klár til tað heilt stóra.

Og inni á vøllinum staðfestu spælararnir, at tað framvegis bara er undanvindur.

Pól Thorsteinsson og Helgi L. Petersen sótu uttanfyri. Hesa ferð var saknurin størri í Helga. Fyrsta korterið trýsti NSÍ EB/Streym í botn, og Gunnar á Steig hevði fleiri meistarligar bjargingar.

Eftir at Djóni N. Joensen hevði stútað til 1–0, dovnaði trýstið, og tað eydnaðist gestunum at taka ferðina úr spælinum. Sorin Anghel, sum nú er heilt komin fyri seg eftir drúgva skaðan, og Jón Sigurd Gleðisheygg høvdu einstakar royndir, uttan at teir settu framúr væl upplagda Jens Martin Knudsen á stórar royndir. Men nervin var framvegis til staðar, tá vanliga leiktíðin í 1. hálvleiki var farin.

So var tað – í tíðini sum dómarin hevði lagt afturat – at Ulrik Balling við ársins máli í Runavík punkteraði dystin. Við bringuni tamdi hann langa sending, og so heilfluktaði hann úr 30 metrum og upp um eitt vet uttarlaga stadda málverjan. Eitt framúr vakurt mál.

Fyri Gunnar á Steig var hetta undirstriking av, hvussu lítið takksamt tað er at vera málverji. Hann var klárt besti maður hjá EB/Streymi, men hann átti ein lítlan lut í báðum málunum. Í fyrra førinum misti hann – fyri einastu ferð – bóltin út aftur, eftir horna frá Sjúrði Jacobsen, og tá bólturin kom innfyri aftur var verjan ikki so skipað, og so stóð hann eitt sindur uttarlaga, soleiðis sum allir aðrir málverjar ivaleyst høvdu gjørt.

### Munur millum menn og dreingir

Annar hálvleikur var bara ein spurningur um, hvussu stórur heimasigurin skuldi gerast. EB/Streymur hevur nógvar góðar og evnaríkar spælarar, men á umleið helminginum á plássunum er talan um dreingir, sum kunnu gerast uppaftur betri. At teir hesa ferð ov ofta mistu í uppspælinum gjørdi tað eyka strevið.

NSÍ liðið er mannað við veteranum og superveteranum umframt teimum, sum eru um at koma í besta fótbóltsaldur, og í 2. hálvleiki vóru hesir aftur betri í øllum førum. Sum hálvleikurin leið spældu teir fyri gallarínum, og tað tóktist ikki hava so stóran týdning, um teir vunnu við fýra ella seks málum.

Óli Hansen økti til 3–0, eftir at Gunnar á Steig hevði dupult bjargað royndum frá innskifta Sonna L. Petersen og Ulrik Balling, og tað var rættur brúdleypsdámur yvir 4–0 málinum. Eddie Mikkelsen, sum leygardagin segði ja til sína Joan, var ikki fyri nothing, tá hann varð skiftur inn. Hann streyk ígjøgnum í vinstru og legði til handara stólpa, har Gert Langgaard, sum rættuliga tykist vera komin fyri seg eftir skaðan, setti krúllin undir bóltin.

NSÍ er framvegis av álvara á meistarakós, og EB/Streymur man væl kunna liva við júst hesum tapinum, sjálvt um tað var tað næststørsta í ár.

**NSÍ-EB/Streymur 4-0 (2-0)**
1-0: Djóni N. Joensen, 13
2-0: Ulrik Balling, 45
3-0: Óli Hansen, 80
4-0: Gert Langgaard, 87
Dómari: Suni Johansen

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Djóni N. Joensen, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Kári Hansen, Jónstein Petersen – Óli Hansen, Ulrik Balling

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Marni Djurhuus, Andrej Paczek, Christian Carlsson, Eyðfinn Joensen – Teitur Joensen, Jákup Martin Joensen, Ronnie Samuelsen, Hans Pauli Samuelsen – Sorin Anghel, Jón Sigurd Gleðisheygg

# KÍ við heimafylgi í Ungarn

**Næstan hálvt hundrað áskoðarar hava tikið av góða tilboðnum og fara í dag við KÍ til ungverska høvuðsstaðin**

EUROPA CUP
*Jóannes Hansen*

Klokkan eitt í dag lættir KÍ úr Vágum. Kósin hjá Atlantsflog verður sett beinleiðis til ungverska høvuðsstaðin Budapest, har KÍ hósdagin skal royna at verja góða 2–2 úrslitið ímóti Újepesti fyri fjúrtan døgum síðani á Svangaskarði.

Ungverski høvuðsstaðurin er komin undan hóttanini, sum nógva regnið seinastu tvær vikurnar hevur verið fyri so nógv lond á europeiska meginlandinum, og tað verður ikki roknað við nøkrum trupulleikum, tá dysturin skal avgreiðast.

Tjúgu spælarar eru í KÍ fylginum. Millum teirra eru fleiri blaðungir, sum hava snoddað eitt sindur til 1. deildarfótbólt í ár. Samlaða KÍ ferðalagið telur 27 fólk. Klaksvíkingarnir fara úr aftur Ungarn tíðliga fríggjamorgunin, og teir ætlast at vera aftur í Vágum fyri døgurða.

Umframt sjálvt KÍ ferðalagið so fara fleiri klaksvíkingar við til Ungarn. Tá vit tosaðu við Fonn flog ferðaskrivstovuna í Klaksvík fyrrapartin í gjár, vóru 43 á listanum, og Leivur Fonn ivaðist ikki í, at uppaftur fleiri fóru avstað í dag. Tilboðið var gott. Áskoðararnir skuldu rinda 2.495 krónur fyri ferðina aftur og fram og uppihaldið í Budapest.

HB-NSÍ 3-0 (1-0):

# HB hongur við

**Botnur og toppur í næstbestu deildini tódnaðu av álvara, tá HB vann tryggan sigur á næstbestu runavíkingunum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*



*Tað vóru fyri tað mesta teir á heimaliðnum, sum vóru kvikari á bóltinum, og tryggi heimasigurin var fult og heilt uppiborin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Farna vikuskifti datt HB fyri fyrstu ferð í ár niður á botnsessin í aðru deild. Serstakliga er hetta íkomið, tí VB av álvara hevur fingið glið á sítt spæl, og tí vóru havnarmenninir mest sum noyddir at fáa nakað burturúr, nú runavíkingar komu á vitjan.

Liðið hjá HB var eisini nakað styrkt í mun til undanfarnu dystirnar. Gunnar Mohr hevur verið burtur frá við skaða, men hann var so tøkur á beinkinum hesaferð, og á miðvøllinum var Ingi Rasmussen komin niður av fyrstu deild, eins og Heini Gaard, sum fyri tað mesta hevur roynt seg hjá útisetunum í ÍF Føroyum seinnu árini, var við á liðnum.

Og tað skuldi eisini vísa seg, at royndu menninir fingu alstóran týdning fyri dystin.

Fyri tað allarmesta, so var tað heimaliðið, sum setti dagsskránna. Runavíkingar høvdu valla nakra veruliga álopsroynd, men tað gekst kortini striltið hjá havnarliðnum at fáa nakað burturúr.

Royndirnar á miðvøllinum gjørdu tó, at leikararnir ongantíð lupu framav í tráðanini eftir einum máli, og fyri steðgin fingu teir eisini løn fyri hetta. Dannu Rasmussen varð hegnisliga sendur avstað í vinstra borðið, og eftir innlegg og eitt sindur av aftur og fram kundi Ransin N. Djurhuus smekka til í netið.

Í seinna hálvleiki helt HB fram við at stýra dystinum, og tá teir eisini skutu seg upp á 2-0, mundu runavíkingarnir ásanna, at dysturin var taptur. Hetta málið var annars eitt av teimum heilt vøkru, tá Eli Thorsteinsson sendi eina langa sending fram til Heina Gaard, sum hegnisliga tamdi bóltin, áðrenn hann langaði til upp í málhornið.

Og fram móti dystarenda kundi máltevið hjá Gunnari Mohr so staðfesta sigurin, eftir at hann hevði fingið bóltin stungnan inn um verjuna.

### Silvurdreymar

Sum vera man, so kom sigurin væl við hjá HB. Gaman í vunnu øll hini botnliðini, men við teimum trimum stigunum halda teir í øllum førum sambandið.

Og so skal heldur ikki gloymast, at tætta støðan í deildini hevur við sær, at tó at havnarliðið í løtuni er á aftasta sessinum í deildini, so er ikki frítt, at tosað verður eins nógv um møguleikan at vinna silvurmerki, sum tosað verður um eina møguliga niðurflyting.

### Dysturin í tølum

**HB-NSÍ 3-0 (1-0)**
1-0: Ransin N. Djurhuus
2-0: Heini Gaard
3-0: Gunnar Mohr



B36-TB 2-1 (0-0):

# B36 fekk ein hvøkk

**B36 fekk ein lítlan skelk, tá TB vitjaði. Eitt skifti vóru gestirnir á odda, og bert ein stórbjarging frá B36-málverjanum forðaði tvørámonnunum í at taka annað stigið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Einki er at siga til, at TB-leikararnir vóru vónbrotnir. Bert eitt sjálvmál forðaði teimum í at skapa eina sensatión í Gundadali, tá teir vitjaðu hjá B36*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Tað var eingin ivi um, at B36 var favoritturin, tá teir tóku ímóti TB. Seianstu umførini hevur árstalsfelagið úr Havnini alt meira líkst einum oddaliðið, og tó at leikbannini eftir sigurin á HB vóru fleiri í tali, so mundu fáur ivast í, at her fór talan at verða um avgreiðsluspurning.

### Fýra á toppinum

Kanska hevði venjarin hjá B36 eisini roknað við einvegis ferðslu, og undir øllum umstøðum mundi hann halda, at TB bara var komið norður at verja málleysa javnleikin, sum dysturin byrjaði við.

Við bert einum stoppara og mest sum fýra álopsmonnum varð í øllum førum lagt upp til álopsfótbólt, men tað var tó langt ífrá soleiðis, at alt varð trýst oman á TB hálvuna fyrstu trý korterini. Gaman í hevði B36 bóltin meira, og tó at Jón Johannesen hevði eina góða roynd í fyrsta minuttinum, so var tað eisini heimaliðið, sum hevði størstu møguleikarnar, men nóg stórir til at gera mál vóru teir so ikki. Heldur ikki hóast onkur av møguleikunum í fyrra vóru av slíkum slag, at mál skuldi verið mest sum eitt krav.

### Kaffi fór í hálsin

Áskoðararnir hjá heimaliðnum mundu tí vera ótólnir, tá farið varð inn til kaffi í steðginum, men, sum ikki var komið niður í steðginum mundi koma heilt skeivt fyri, tá farið varð undir seinna hálvleik.

Tað tók nevnliga TB bert eitt minutt og 15 sekund, so var bólturin at finna í B36 meskunum. Ein langur bóltur varð sendur oman á B36 hálvuna. Jón Johannesen fekk lyft bóltin inn um verjuna, og so kundi Dan Mortensen púra einsamallur við málverjanum syrgja fyri einari púrasta óvæntaðari leiðslu.

Eitt skifti vóru teir á heimaliðnum negldir, men teir komu tó fyri seg aftur. Bæði tað at uppstillingin nú var broytt til eina meira heimliga 3-5-2, eins og TB nú tók seg longu aftur gjørdi, at fyritreytirnar at trýsta mótstøðuna gjørdust betri.

Og tað tók heldur ikki so langa tíð, so var javnleikurin veruleiki. Fríspark varð sent inn í TB brotsteigin, har John Petersen var hægstur. Stútarin frá honum tók í tvørtræið, men í aðru atløgu var Julian Johnsson fyrstur á staðnum, soleiðis at hann kundi beina bóltin í málið.

Sum vera man, so viðførdi málið eitt enn størri trýst á TB, men hóast hetta, so var talan um eitt kontramál, tá B36 loksins fekk lagt seg á odda. B36 vann bóltin, tá TB var á veg niðan eftir vøllinum, og so gekk tað skjótt fyri seg. Uppspælið varð ført fram í vinstru, haðani Magni á Lakjuni sendi innfyri. Bárður Mortansson gjørdist akkurát ov stuttur at røkka innlegginum, men Vladimir Matijivic, ið kom rennandi aftan á honum, var somikið óheppin, at hann beindi bóltin í egið mál.

### Mundu mist

Flestu mundu nú halda, at dysturin var avgjørdur. Eisini B36, sum eftir hetta tók seg longur aftur á vøllin til tess at halda fast um leiðsluna, men tað var tó um reppið, at hetta kostaði teimum dystin.

Ikki tí. Teir høvdu eisini eftir hetta onkrar møguleikar, sum áttu at givið mál, men við at leggja seg longu aftur, lovaðu teir eisini gestunum inn aftur í dystin. Opnu málmøguleikarnir vóru kanska ikki so nógvir, men fleiri ferðir gjørdist talan um hornaspørk, og við leikarunum sum eitt nú Óla og Jón Johannesen kann ofta vera vandaikið við hornaspørkum. Nærmast við vóru tvørámenninir tó stutt fyri leiklok, tá teir áttu fríspark nakað uttan fyri brotsteigin. Vladimir Matijivic varð settur at skjóta, og var tað ikki fyri eina stórbjargin frá René Tórgarð í B36-málinum, so hevði talan helst verið um eina perlu av einum máli, men tað var so av ongum, og B36 slapp soleiðis við hvøkkinum. Teir fingu tey trý ætlaðu stigini, og tað mundi eisini telja mest í teirra hugaheimi.

TB hinvegin misti ein óvæntaðan møguleika at vinna sær nøkur stig í botnstríðnum, sum gjørdist enn tættari, nú Skála fekk javnleik í Vági, men avrikið í Gundadali ber tó boð um, at bjargingin hjá liðnum kanska ikki er so øgiliga langt burturi kortini.

**Dysturin í tølum**
**B36-TB 2-1 (0-0)**
0-1: Dan Mortensen, 47
1-1: Julian Johnsson, 54
2-1: sjálvmál, 66
Dómari: Oddmar Andreasen

**B36:** René Tórgarð - Egil Zachariasen, Herbert í Lon Jacobsen – Niels Joensen, Klæmint Matras, Julian Johnsson, Niels Joensen – Bárður Mortansson, Tórálvur Poulsen, John Petersen, Magni á Lakjuni

**TB:** Lars Müller - Nebosja Urtajl, Óli Johannesen, Vladimir Matijivic - Bárður Dimon, Dan Mortensen, Jón Johannesen, Olivur Abrahamsen, Craig Dean, Einar Petersen - Allan Michelsen

VB-LÍF 3-1 (2-0):

# Arbeiðsigur til vágbingar

**Trý stig vóru týdningarmiklari enn vakurt spæl hjá VB. Hóast leirvíkingar høvdu nógv spæl og málmøguleikar, bleiv dysturin akkurát sum vágbingar høvdu vónað frammanundan**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað vóru ikki nógv, sum fyri einum mánaða síðani góvu vágbingum nakran møguleika at verða verandi í 2. deild næsta ár. Men sum gongdin hevur verið seinastu umførini, kann alt henda, og VB liggur nú nummar 8 og hevur bæði HB og LÍF aftanfyri seg.

Og júst LÍF var mótstøðuliðið á Eiðinum í Vági leygardagin, og tí var tað umráðandi at tað bleiv til ein sigur.

### Sama uppskrift

Og dysturin gekk akkurát sum vágbingar høvdu vónað. LÍF hevði bóltin mest, men mótálopini vóru sum ikki einaferð vápnið hjá vágbingum. Longu tá 7 minuttir vóru farnir spældu VB seg ígjøgnum í vinstru síðu, bólturin kom flatt innfyri og har kundi Kári í Lágabø skjóta bóltin upp undir nettakið til 1-0.

Leirvíkingar royndu at koma yvir hesa sjokkbyrjan, og teir høvdu eisini nógv spæl og komu fram til onkrar hálvar møguleikar. Men annaðhvørt stóð verjan hjá VB í vegin ella bjargaði málmaðurin royndunum.

Sum fyrri hálvleikur leið trektu vágbingar seg nakað longur aftur, tí umráðandi var at fara til hálvleik við einari 1-0 leiðslu. Hetta viðførdi so, at lorvíkingar fingu lagt enn størri trýst á VB, men tað bleiv ongantíð til teir heilt stóru møguleikarnar. Vágbingar stríddust fyri hvønn bólt, og fingu tí eisini steðgað nógvum uppspæli hjá LÍF.

Tá so bert sekundir vóru eftir av fyrra hálvleiki, fekk VB fríspark nakað uttan fyri brotsteigin hjá LÍF. Frísparkið kom væl innfyri, og við aftastu stong stóð Birgir Jørgensen púra ódekkaður og setti høvdið á so bólturin fór í mál til 2-0.

Hetta var sum at fáa ein kaldan frammaná hjá leirvíkingum, sum meginpartin av fyrra hálvleiki høvdu roynt at fingið javnað leiðslumálið hjá VB. Nú vóru teir brádliga tvey mál aftanfyri.

### Spenningur í aftur

Men tað gingu bert tveir minuttir av seinna hálvleiki, so fekk LÍF vónina aftur. Vágbingar vóru ikki nóg avgjørdir í verjuni og mistu bóltin í høgru síðu. Leirvíkingar løgdu bóltin væl innfyri innanfyri VB-verjuna, og har kom Petur Sjúrðarberg og setti innaru síðu á so bólturin fór í mál.

Næsta løtan var eitt stórt trýst móti VB-málinum, og LÍF kundi havt javnað tá tveir leirvíkingar komu fríir við málmanninum hjá VB. Men tá teir skuldu spæla framvið málmanninum sum kom út, sendu teir bóltin við síðuna av, so onki spurdist burturúr.

Sum frá leið, minkaði trýstið fra LÍF, og vágbingar fingu eitt sindur av luft. Og miðskeiðis í seinna hálvleiki fall so avgerðin.

VB fekk fríspark heilt úti í høgru síðu. Niclas Ludvig royndi seg við einum beinleiðis skoti, og bólturin fór í mál til 3-1.

Hetta var seinasta málið sum kom í dystinum. Restina av tíðini vardu VB við nærum øllum monnum á egnari hálvu, og hóast nakrar royndir frá LÍF og okkurt mótálop frá vágbingum, hendi ikki meira.

VB fekk sostatt trý týdningarmikil stig, og fór við sigrinum framum LÍF. Sigurin hjá VB kom fyrst og fremst í hús við einum góðum stríðsvilja. LÍF hevði bóltin mest og tað passaði VB fínt, tí so kundu vágbingar dúva uppá mótálop. Leirvíkingar fingu ov lítið burturúr tí spælið sum teir høvdu.

**Dysturin í tølum:**
**VB-LÍF 3-1(2-0)**
1-0: Kári í Lágabø
2-0: Birgir Jørgensen
2-1: Petur Sjúrðarberg
3-1: Niclas Ludvig